

# VINNUSÍÐURNAR

*Í Sosialinum mikudagar · fyrstu ferð 1. desember*

# BLAÐIÐ við føroysku VINNU tíðindunum

## *Hvønn dag* *men serliga mikudag*

Frá 1. desember fer Sosialurin mikudagar (annanhvønn at byrja við men seinni hvønn mikudag) at gera meira burtur úr føroyska vinnulívinum. Á sama hátt sum vit t.d. týsdagar gera meira burtur úr ítróttinum og leygardagar meira burtur úr mentanini og orðaskiftinum, so fara vit mikudagar hereftir at gera meira burtur úr vinnulívstilfari.

Hetta er sjálvandi ein táttur, sum finst í blaðnum hvønn dag, men rætt er í hvussu er aðruhvørja viku at steðga á og viðgera vinnulívsmál í størri mun.

Hetta er eisini ein ásannan av, at tað er eitt ynski millum lesarar okkara, at vit gera meira burtur úr vinnulívinum. Sosialurin hevur annars hesi mongu seinastu árini gjørt serbløð um vinnulívið, sum koma einar tvær ferðir um árið. Hetta er eisini nakað vit fara at halda fram við, serstakliga í sambandi við ráðstevnur á vinnulívsøkinum. Eitt slíkt serblað kemur sum íkast í Sosialinum nú leygardagin.

Hugsanin aftanfyri hesum vinnulívstáttinum í blaðnum er bæði at kunna lesaran um tað, ið vinnan tekst við í dag eitt nú við at vitja virki og arbeiðspláss kring landið, men vit fara eisini at seta fokus á ársroknskapir og hagtøl fyri vinnulívið annars. Somuleiðis fara vit at bjóða til og leggja upp til eitt orðaskifti/debat um vinnulívið. Hvørja viku fer eitt vinnulívsfólk ella onnur í samfelagnum við áhuga fyri vinnulívinum at siga sína hugsan.

Vit halda, at tað hevur alstóran týdning fyri eitt samfelag sum okkara, at miðlarnir gera nógv burtur úr vinnuni. Sjálvandi er torført hjá einum blað, sum eisini skal viðgera flest øll samfelagsmál dag um dag, at gera serliga nógv burtur úr onkrum einstøkum tátti. Tó so – tá hetta er eitt ynski og eisini hevur áhuga okkara – eiga vit at gera tað.

Sosialurin fer í næstu framtíð at flyta oman í miðbýin í Havn, har vit fáa góðar og rúmligar umstøður. Í tí sambandi verður eisini léttari hjá okkum og tykkum at samskifta og samstarva. Vit verða í mongum førum nærri tykkum og tit nærri okkum. Men tað er eisini ein verð uttan fyri Havnina, og tað ásanna vit. Tí hava vit eisini ment okkara redaktiónir úti kring landið og fara at gera tað framhaldandi á ymsan hátt.

Tað skal vera okkara vón, at vinnulívið í landinum tekur væl ímóti hesum okkara tiltaki á einhvønn hátt, tvs. við at senda okkum tilfar, lýsa í blaðnum og annars vísa hesum tiltaki ans, tá tiltøk av einumhvørjum slag eru.

Fyrstu "VINNU-síðurnar" í Sosialinum koma í blaðið mikudagin 1. desember. Sendið okkum hugskot, tilfar og eisini lýsingar. Freistin at senda okkum lýsingar til fyrsta blaðið við VINNUSÍÐUNUM er fyrrapartin mándagin 30. november. Ringið eisini til okkara, spyrjið eftir lýsingadeildini.

**Sosialurin**

Box 76 · 110-Tórshavn · Tel. 341 800 · Fax 341 801 · post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo




RUNAVÍKAR HAVN

www.runavik.fo



Runavíkar Havn er framvegis fyrireikað til veitan av tænastum innan oljuvinnu, fiskivinnu, farmaflutningi og ferðavinnu

RUNAVÍKAR HAVN · TEL 44 70 15 · FARTEL 22 51 14 · FAX 44 89 20 · VHF KANAL 16 · WWW.RUNAVIK.FO








LICENSED ACREAGE
**FAROE PETROLEUM PLC**

Faroe Acerage · UK Acerage
Oil Fields · Gas Fields · Gas Pipeline

**Føroyar:** Føroya Kolvetni P/F · Bryggjubakki 22 · P.O. Box 1098
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel: +298 320 450 · Fax: +298 320 451

**Bretland:** Faroe Petroleum plc · 24 Carden Place · Aberdeen · AB10 1UQ
Tel: +44 1224 652 810 (switchboard) · Fax: +44 1224 643 243

e-mail: faroe-petroleum@faroe-petroleum.com · www.faroe-petroleum.com

Faroe Petroleum